Bátasmiðurin:

# »Gævi hann verður h

**At smíða ein føroyskan bát kann ikki samanberast við nakað annað. Ein slíkur bátur hevur nevniliga eina sál, sigur Terji Jacobsen, sum er einasti føroyingur, sum hevur bátasmíð sum fulltíðarstarv**

BÁTASMÍÐ
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tollar, tyljir, áraskeyti, borðskeyti. ... At hoyra Terja Jacobsen greiða frá sínum dagliga yrki sum bátasmiður er næstan sum at verða sett eini 50 ár aftur í tíðina. Orð, tú ivaleyst bara kennir frá onkrari skúlabók, fáa knappliga nýtt lív, og Terji brúkar tey líka natúrliga, sum tá hann tosar um hamara og seym. Men hvat fær ein 37 ára gamlan familjumann at siga sítt fasta starv sum húsasmiður frá sær og velja sær eitt yrki, nógv av okkum ivaleyst hildu var farið í søguna fyri langari tíð síðani?

## Málið partur av fakinum

– Ein av orsøkunum er kanska nettup, at um ikki onkur av teimum yngru tekur við, so er vandin fyri at hetta yrkið hvørvur rættiliga stórur, sigur Terji og leggur afturat at hatta við at nýta hesi serligu orðini fyri teir ymsu lutirnir var nakað, hann fekk inn undir húðina, tá hann lærdi hetta yrkið.

– Eg var so heppin at fáa framúrskarandi bátasmiðin Símun Jóhan Wolles av Eiði til lærumeistara, og hann legði mær eina við at brúka gomlu føroysku heitini um teir ymsu bátslutirnar. Orðini, tú brúkar, eru ein týdningarmikil partur av fakinum, og ansar tú ikki eftir, eru tey horvin, áðrenn tú veit av, tí ongin brúkar tey, ella brúkar tey skeivt. Símun Jóhan plagar at flenna, tá hann hoyrir fólk tosa um at fara út at sigla við seglum. "Hatta er líka skeivt, sum um tú segði, at tú fert út at ganga við beinunum", plagar hann at taka til. Fert tú at stima, er tað við motori, fert tú at rógva, brúkar tú árar, og fert tú at sigla er tað also við seglum, greiðir Terji frá og letur ongan iva vera um, at føroyskt bátasmíð er meir enn bara eitt handverk.



*Hevur tú veruliga áhuga fyri tí handverksliga í timburarbeiði, so trúgvi eg, at bátasmíð altíð kemur at standa, sum ein fyrimynd, sigur 37 ára gamli Terji Jacobsen, sum seinastu fýra árini hevur havt bátasmíð sum fulltíðarstarv*

## Gamal dreymur

Terji smíðar bátar eftir gamla føroyska sniðinum ella rættari eftir sniðinum hjá Símuni Jóhan, tí hvør bátasmiður hevur sítt egna snið. Og hansara týdningarmesta amboð er eygamálið.

– Í einum føroyskum báti er ikki ein einasta linja snórabein, so tú kanst gloyma alt um waterpas og vinkul. Hetta kann als ikki samanlíknast við at smíða hús ella annað vanligt timburarbeiði, so fyri ein húsasmið, sum meg, var tað sum at vera lærlingur aftur, tá eg byrjaði at smíða bátar. Í staðin fyri tekningar brúkar tú eygamálið, og tí fær hvør einasti bátur sín egna persónliga dám, eisini tí nógv veldst um, hvat tilfar tú hevur at arbeiða við. Báturin fær so at siga sína egnu sál. Í so máta er føroyskt bátasmíð kanska mest eitt millumting millum handverk og list, heldur Terji.

Fyri Terja byrjaði alt hetta í 1988, tá verfaðurin ein dagin ringdi og bað hann koma at hyggja uppá bátin hjá sær, sum var illa farin í tiltiknu jólaódnini. Ætlanin var, at Terji skuldi umvæla bátin, men tað vísti seg skjótt, at hetta arbeiðið fór at verða meir umfatandi enn so. Terji hevði hoyrt um dugnaliga bátasmiðin av Eiði og setti seg í samband við hann at biða um góð ráð.

– Símun Jóhan kom at hyggja uppá skaðarnar og helt beinanvegin, at tað mundi loysa seg best heldur at smíða bátin av nýggjum. Hann skuldi nokk leggja mær lag á, lovaði hann, men tað var ikki fyrr enn Símun Jóhan hevði reist bátin, at eg tordi at halda meg til. Síðani ferðaðist Símun Jóhan trúfastur av Eiði til Kollafjarðar so gott sum hvønn dag fyri at vita, hvussu leikur fór og fyri at rætta eina hjálpandi hond - og tað mundi rættiliga ofta vera neyðugt, smílist Terji og minnist, at hann var ikki sørt errin, tá hansara fyrsti bátur stóð liðugur.

– Líka síðani eg var smá-